

*- Vit kunnu eisini vera kreativ her í Klaksvík, sigur Heðin Ferjá Heldarskarð, sum samstarvar við Karl Hera Joensen úr Klaksvík og Jackie Joensen úr Havn, og sum her lyftir ein av mongum steinum í stórum varða*

# Gamalt grót í nýggjan býling

Fyri eini trimum vikum síðani varð av álvara lagt til brots við laðingini av varðanum.

Neyðugt var ikki at fara í hagan eftir gróti. Tað hava teir fingið til vega úr ymiskum niðurdotnum úthúsum í bønum á Gerðum.

- Hetta hevur eisini eitt symbolskt virði: Ein tekur grót sum áður hevur verið laðað í einum gomlum býlingi. Nú kann ein brúka tað aftur í einum nýggjum, sigur Heðin.

Síðani Heðin fyrstu ferð fekk hugskotið um henda varðan, hevur hann havt eina tíðarætlan í høvdinum.

Ætlanin var upprunaliga at hesin varðin skuldi verða liðugur á norðoyastevnu í ár. Men so verður ikki.

- Nei, veðrið hevur verið eitt sindur ólagaligt til stál- og sveisiarbeiðið, og tí náa vit tað ikki áðrenn vikuskiftið.

- Men tá verður í øllum førum ikki nógv eftir, lovar Heðin.

ein ringur spentur fastur. Hesin skal symbolisera ein sirkul, sum, eins og ein giftiringur, er eitt tekin um eina eind, nakað sum varir og á nakað sum er óendaligt.

- Eg ynski við hesum at vísa á samanhaldið millum ta gomlu og ta nýggju Klaksvíkina, sigur Heðin.

*» Tann blái liturin er eitt tekin um lív, og skal í hesum sambandi symbolisera tann veruleikan, at lív fer at koma í ein nýggjan part í býnum«*



*- Tað vísti seg at øll í býráðnum høvdu áhuga í at fáa henda varðan laðaðan. Og hann verður eisini ótrúliga vakur, tá hann er liðugur, sigur Heðin Heldarskarð*